**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

*Okkum tørvar nýskapan í bygnaði og umsiting okkara*

## Fíggjarfulltrúi til Føroya Studentaskúla og HF-skeið

Á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði stovna vit nú eitt nýtt og spennandi starv sum fíggjarfulltrúi.

Vit stovna hetta starvið sum ein lið í eini tilgongd at nýskapa og nýgera umsiting og fíggjarstýring okkara. Alt miðnámsskúlaøkið í Føroyum stendur fyri stórum umskipanum, og í hesum sambandi er Føroya Studentaskúli og HF-skeið í ferð við at menna sín innanhýsis bygnað og sínar visiónir fyri at kunna møta teimum nýggju avbjóðingunum.

**Uppgávur**
Fíggjarfulltrúin verður ein stápsfunktión, sum skal stuðla leiðslu og umsiting skúlans, og kemur at arbeiða tætt saman við rektaranum. Fíggjarfulltrúin setir fíggjarlætlanir upp í samráði við rektaran og fylgir teimum loypandi upp. Hann/hon umsitur og roknar lønir. Hann/hon skal menna mannagongdir í dagliga arbeiðinum við at leggja til rættis og fylgja fíggjarligu viðurskiftum skúlans upp. Hann/hon tekur sær av málsviðgerð, ið hevur við fíggjar- og lønarmál at gera. Hann/hon ráðgevur leiðsluni í spurningum um fíggjarliga stýring, herundir at gera fíggjarligar útgreiningar av námsfrøðiligum og organisatoriskum átøkum, og luttekur sum ráðgevi í arbeiðinum við at menna skúlan bygnaðarliga, skipanaðarliga og strategiskt.

Nýggj skipan fyri gymnasialu miðnámsskúlaútbúgving arnar kemur eftir ætlan í gildi frá august 2009. Í hesum sambandi liggur í kortunum, ein heilt nýggjur lønarnormur skal setast í gildi. Skift verður frá vikutíðarnormi til árstíðarnorm. Tí skal øll lønar- og arbeiðstíðarumsitingin byggjast upp av nýggjum frá grundini av. Hetta verður eisini ein uppgáva hjá fíggjarfulltrúanum.

Harumframt skal Føroya Studentaskúli og HF-skeið inn í eina umsitingarliga samanleggingartilgongd við hinar gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar í Streymoynni í sambandi við skipanina av skúladeplinum í Marknagili.

Fyri tann rætta persónin er talan um eitt sjálvstøðugt og spennandi starv við nógvum avbjóðingum.

**Førleikakrøv**
Tú hevur hægri útbúgving (Master ella bachelor) innan búskap og fíggjarstýring ella tilsvarandi útbúgving og royndir. Vit vænta, at tú hevur góð evni at seta teg inn í nýggj viðurskifti, hevur góð samstarvsevni og gott innlit í nútíðar amboð til starvsfólka-, fíggjar- og lønarumsiting. Vit vænta harumframt, at tú eisini hevur førleika at geva eitt íkast til arbeiði okkara at menna skúlan sum organisatión.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tann, ið settur verður má rokna við broytingum í starvs- og setanarviðurskiftunum í sambandi við tær umfatandi bygnaðarligu broytingarnar, sum eru nevndar omanfyri.

**Umsóknarfreist o.a.**
Umsóknir skulu vera í okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 28. august. Umsóknin verður at senda til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, 188 Hoyvík ella á t-post adr. skrivstovan@hoydalar.fo.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, á t-posti mikkjal.helmsdal@skulin.fo, telefon 312973 ella fartelefon 218404.

# *Bakara lærlingur*

Hevur tú hug, at útbúgva teg innan bakarayrki, hava vit eitt lærupláss leyst, at søkja.

Bakaríið Grón hevur eina sera fjølbroytta framleiðslu innan alt bakarahandverk, har tú kemur at arbeiða í einum góðum arbeiðsumhvørvi saman við nógvum røskum fólki.

Bakaralæran er ein fjølbroytt útbúgving, ið gevur fleiri framtíðarmøguleikar. Nøkur velja at halda fram, har tey hava lært, meðan onnur vilja royna okkurt annað. Eitt nú starvast fleiri bakarar umborð á cruiseskipum, í oljuvinnuni og innan hotelvinnuna.

Bakaralæran gevur eisini møguleika fyri víðariútbúgving til m.a. matvørutøkning.

Lærutíðin til bakara er 3 ár og 7 mðr., harav 38 vikur á tekniskum skúla í Danmark.

Ætlanin er, at tú skal byrja skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir rætta viðkomandi.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið Grón**
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 236211 ella 312161



## Sunnudagsskúli í Hoyvík

Hvønn sunnudag klokkan 11 er sunnudagsskúli í Hoyvíkar kirkju.

Tú ert eisini vælkomin at verða við.

**Vegna sunnudagsskúlan í Hoyvíkar kirkju**

**Snorri Brend (fartlf. 598599)**

# HEYSTRÍÐING

Kappríðing verður í Marknagili leygardagin 30. august kl. 15. Tilmelding seinast mikudagin 27. august kl. 19.

**Ring: 219098 · 211789 · 211868 · 263239**



**FØROYA RÍÐINGARFELAG**

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

## Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum

Av tí at skúlatænari okkara hevur avgjørt at leita sær eftir øðrum avbjóðingum, søkir Føroya Studentaskúli og HF-skeið eftir skúlatænara.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá skúlatænaranum eru: At hava umsjón við og røkja bygningarnar hjá stovninum, at hava ábyrgd av, at økið uttan um bygningarnar verður røkt, og at hita-, vatn- og elskipan riggar. At rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa at halda skil á dagligum viðurskiftum kring virksemi skúlans.

Skúlatænarin er leiðari fyri reingerðarstarvsfólkunum og hevur harumframt tveir hjálparskúlatænarar undir sær í dagliga arbeiðinum. Arbeiðið hjá skúlatænarunum verður skipað í vaktum, og roknast má við skiftandi arbeiðstíðum.

**Førleikar**

Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, evni at skipa fyri, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur teldufførleiki er eisini neyðugur í starvinum. Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur men ikki eitt krav. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og handverkarafeløgini. Afturat sáttmálalønini verður latin ein viðbót fyri leiðsluábyrgd og skeivar arbeiðstíðir. Starvið verður at seta skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973, fartelefon 218404 ella Holgar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi hósdagin 28 august, kl. 12.00.

**KIOSK ACTIV**

# Starvsfólk søkist

Søkt verður eftir krambafólkið til at arbeiða kvøldvaktir í Kiosk Activ, J. Broncksgøtu at byrja skjótast gjørligt.

**Nærri fæst at vit við at ringja á tlf. 73 37 41**